umborð

# Stríddist eitt langt lív og seldi seg ríkan

**- Vit hava skrivað eitt neyvt testamenti, og í hesum er eisini skrivað, at vit bæði, tá tann tíðin kemur, vilja jarðast í Emmersbæk Kirkjugarði í Hirtshals. Til stuttleikar hava vit sagt, 'at verður peningur eftir at arva hjá børnum okkara, tá vit eru farin – ja, so er tað ein roknifeilur, sigur nólsoyingurin, Jens Sigmund Jacobsen, brosandi**

## Umborð



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo

Sosialurin hevur leitað sær ein túr til Hirtshals og hevur vitjað inni á gólvinum hjá hjúnunum, Jens Sigmundi og Sigvør Jacobsen, sum bæði eru ættað úr Nólsoy. Mundi, sum Jens Sigmund vanliga verður róptur, byrjaði blaðungur at sigla, og seinastu 32 árini hava hann og konan búð í Hirtshals. Tvey av trimum børnum, Sólfinn og Winnie, búgva eisini í Danmark, meðan elsti sonurin, Jan Kjell, er giftur føroyskari konu og býr í Havn.

- Eg flutti niður at búgva, tá eg fór at føra nótaskipið Strømegg, og árið eftir flutti familjan eisini. Í fyrstani segði kona mín, at hon vildi royna at búgva í Danmark í tvey ár, men tá tvey ár vóru umliðin, helt hon, at hon vildi royna í fimm ár, sigur Mundi, ið fór umborð á Strømegg sum skipari hin 16. oktober í 1976.

Í dag – meira enn 30 ár seinni – búgva hjúnini framvegis í Hirtshals, og nú er eingin ivi í teirra sál um, hvar tey vilja búgva síni pensjónsár.

- Vit hava skrivað eitt neyvt testamenti, og í hesum er eisini skrivað, at vit bæði, tá tann tíðin kemur, vilja jarðast í Emmersbæk Kirkjugarði í Hirtshals. Til stuttleikar hava vit sagt, at verður peningur eftir at arva hjá børnum okkara, tá vit eru farin – ja, so er tað ein roknifeilur, sigur Mundi brosandi.

Árini 1986-2004 átti Mundi saman við øðrum nótaskipið Herdis J. Í byrjanini vóru fleiri, sum áttu í skipinum, men seinnu árini av hesi tíðini, og tá teir í 2004 fingu eitt sera gott tilboð upp á skipið, vóru teir fýra eigarar. Umframt Munda, vóru eigararnir Sólfinn, sonur hansara, bróðirin Grækaris og skopuningurin, Arngrím Zachariassen.

- Tilboðið var so mikið gott, at vit kundu illa lata tað fara aftur við borðinum, sigur Mundi, sum ikki vil siga alment, hvussu nógv teir fingu burtur úr søluni.

Hann sigur, at sjálvt skipið var ikki nógv vert, tó at tað var í góðum standi, men at tað vóru kvoturnar, sum skipið átti, ið høvdu stórt søluvirði.

Vit kunnu tó leystliga rokna okkum til, at rættiliga nógvar miljónir lógu eftir, og at Mundi saman við hinum eigarunum at enda fekk "løn" fyri sítt stríð á havinum gjøgnum so mong ár.

### »Når du er rig«

Á koppinum, hann situr við, meðan vit práta í hugnaliga heiminum hjá honum og konuni í Hirtshals, stendur, at "det er ikke let at være SLANK, når du er rig.."

- Henda koppin havi eg fingið frá einum av mínum abbabørnum, sigur fryntligi nólsoyingurin og brosar.

Áðrenn Mundi fer at siga okkum frá lívi sínum, spyrja vit hann, hvaðani navnið Mundi stavar.

- Eg hevði ein pápabeiggja, sum doyði undir krígnum. Hann sigldi við farmaskipi, tá teir vórðu bumbaðir. Hesin kallaðist Jens Sigmund og varð róptur Mundi. Eg varð uppkallaður eftir honum og bleiv eisini róptur Mundi, sum er ein stytting av navninum Sigmund.

Hann veit at siga, at í Íslandi er ikki óvanligt, at menn verða róptir Mundi, men tað er so ikki haðani, at navnið stavar.

### Fór ungur til skips

Sum 14 ára gamal fór Jens Sigmund sín fyrsta túr til skips. Hetta var á sildaveiði við kolfýrda skipinum Lunarbow, sum var keypt úr Onglandi. Tað vóru brøðurnir, Poli og William Smith, sum reiddu skipið út.

- Hetta var í juli mánaða í 1955. Skipari var nólsoyingurin, Vilmund Poulsen. Vit fiskaðu norðanfyri. Byrjaðu við 60 gørnum, men endaðu niðri á 40 gørnum. Haldi meg minnast, at vit fingu einar 1800 tunnur av sild hetta fyrsta árið, eg var við.

Hvørki sum blaðungur, ei heldur seinni í sjólívinum, kendi Mundi nakrantíð til sjóverk.

Eftir sildavertíðina fór Lunarbow til Svøríkis, har ein gomul dieselmaskina varð sett í skipið. Ferðin gjørdist nú størri, men maskinan riggaði ikki so væl. Munurin var, at nú høvdu teir ongan fýrbøtara umborð. Teir gjørdu eisini onkran línutúr í Íslandi, og tá var Vilmund eisini skipari.

- Nú fóru Vilmund sum bestimaður við Varðanum, sum Volfgang Andreassen á Oyrarbakka førdi, og tá bað hann eisini meg koma við, sigur Mundi.

### Eisini við Stella Argus

Eitt skifti var nólsoyingurin við Stella Argus, og hann var eisini við túrin fyri, at skipið, sum tá var á sildaveiði, gekk burtur við mann og mús í oktober mánaða í 1957.

Hvussu hann kom umborð á Stella Argus, greiðir Mundi soleiðis frá:

- Vit fóru til Havnar við Rituni, og eg skuldi við aftur Varðanum. Men tá kom Clæmint Jacobsen, vanliga róptur lítli Clæmint og sigur, at teimum vantar ein mann við Stella Argus. Eg helt, at hetta ljóðaði so fantastiska gott í mínum oyrum, tí hetta var jú ein stórur trolari.

Mundi sigur, at hann fór nú umborð á Varðan eftir klæðum og koyrdi tey umborð á Stella Argus.

- Eg sá ikki Volfgang, tá eg var umborð eftir klæðunum, og eg føldi meg ikki serliga væl. Eg samlaði klæðini saman og stakk av. Hetta skuldi eg ikki havt gjørt. Tá eg kom umborð á Stella Argus, sá eg, at eg hevði tikið tveir stivlar við, sum báðir vóru upp á sama bein. Annar stivlin var stivlin hjá skiparanum, Volfgang. Tað gloymi eg ongantíð aftur, sigur hann.

Hendan túrin fór Stella Argus í Barentshavnið. Teir vóru burtur í einar 11 vikur og fingu 180 tons í saltfiski.

- Tá vit komu heimaftur úr Barentshavinum, fór skipið á sildaveiði. Mamma hevði søkt á Háskúla fyri meg, so eg fór bara henda eina túrin á sild. Eg fór av Stella Argus um heystið túrin fyri, at skipið gekk burtur, sigur Mundi álvarsamur.

### Aftur við Varðanum

Tá Búgvin sum nýbygningur kom av Tórshavnar Skipasmiðju, fór Volfgang at føra Búgvan, og tá gjørdist Vilmund Poulsen skipari við Varðanum.

Eftir háskúlatíðina var Mundi aftur umborð á Varðanum, og í Íslandi í 1958 upplivdi manningin eina syrgiliga hending, sum kostaði skiparanum lívið.

- Eg meini, at vit vóru fýra nólsoyingar við Varðanum um hetta mundi. Vilmund, sum var skipari, bróðursonur hansara, Jens Ferdinand Poulsen, Tummas Joensen og eg sjálvur. Á hesum túrinum hendi tað, at Vilmund kom til skaða av eini keðiligari hending og doyði í Íslandi.

Mundi sigur, at tá Vilmund var deyður, fór ein kollfirðingur at føra Varðan.

- Nú fóru vit á sild, og Jens Ferdinand og eg vóru framvegis við skipinum.

Tá sildavertíðin var liðug, setti Mundi seg at skriva eitt bræv til Volfgang, har hann spurdi, um hann kundi sleppa at sigla hjá honum aftur.

- Jú, tað var gamaní, og nú vóru eg og Jens Sigmund aftur við Búgvanum við Volfgang sum skipara. Mær dámdi Volfgang væl, og hann hevur altíð behandlað meg væl, sigur nólsoyingurin í Hirtshals.



*- Í fyrstani segði kona mín, at hon vildi royna at búgva í Danmark í tvey ár, men tá tvey ár vóru umliðin, helt hon, at hon vildi royna í fimm ár. Nú koma vit ikki heimaftur til Føroya at búgva, siga hjúnini, Sigvør og Jens Sigmund Jacobsen, vanliga róptur Mundi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*